# *Bønar- og tíðindabræv frá* Halli, Shino og Kano Mortensen



Kæru øll tit heima í Føroyum. Vónandi hava tit havt eini sera góð jól. Vit ynskja tykkum øllum eitt gott og signað nýtt ár.

Fyrst av øllum takka vit øllum tykkum, sum hava biðið fyri okkum og stuðlað okkum, síðani vit fóru úr Føroyum. Tað hevur eggjað og styrkt okkum sera nógv.

**Koma til Nigeria**

Vit komu til Abuja, høvuðsstaðin í Nigeria, tann 5. oktobur. Tað gekk væl at koma inn í landið, og vit vóru glað, tá vit fingu fatur á øllum viðførinum, tí vit høvdu næstan væntað, at okkurt fór at ganga galið.

Vit vóru sera væl móttikin í Nigeria av eini trúboðarafamilju,sum eisini arbeiðir við Mission Africa. Vit steðgaðu hjá teimum í nakrar dagar og lærdu frá teimum mangt og hvat um at búgva í Nigeria, um samkomuna, mentanina og skúlan, har Hallur fer at undirvísa.

**Koma til Ankpa**

Ætlanin var, at vit fyrst skuldu fara til sunnara partin av landinum í nakrar vikur til WWCT bíbliuskúlan fyri at læra av einum trúboðarahjúnum. Men av tí at støðan har suðuri í landinum versnaði, varð túrurin avlýstur, og vit koyrdu beinleiðis til Ankpa í Kogi landslutinum tann 11. oktobur.

Okkara fyrsta uppgáva var at gera húsið klárt at flyta inn í, og tær fyrstu vikurnar fóru við at vaska, mála og gera alt í stand.

**Lívið í Ankpa**

Eftir at hava verið í Ankpa í eini tveir mánaðir, eru vit nú vorðin von við ein nýggjan lívsstíl. Vit lærdu skjótt, at tað at vera til er næstan eitt fulltíðar arbeiði her. Alt tekur meiri tíð. T.d. mugu vit koyra inn í býin annan hvønn dag eftir vatni og so fylla tangarnar við hús. Vit lærdu eisini skjótt frá teimum, sum búgva her, at savna regn av tekjuni hvønn dag í regntíðuni og onkuntíð eisini um náttina. Vatnið verður síðani reinsað til reint drekkivatn.

Eisini eru trupulleikar við streyminum, sum vit bara hava nakrar tímar um dagin og við hvørt als ikki. Tí er neyðugt at hava sín egna generator til at framleiða streym, so javnan má farast inn í býin at keypa bensin. Alt, sum vit vanliga rokna sum sjálvsagt, tekur langa tíð og nógva orku. Ruskið mugu vit eisini sjálvi brenna.

**Skúlin**

Eftir av hava verið í Ankpa og á skúlanum í tveir mánaðir, eru vit nú klár at savna okkum um arbeiðið á skúlanum. Hallur skal byrja at undirvísa í skúlanum eftir jólafrítíðina í fýra lærigreinum: Rómbrævinum, Ápostlasøguni, Hirðabrøvunum (Timoteus og Titus) og gamla testamentligari gudfrøði. Hetta er bæði áhugavert, avbjóðandi og kanska eitt sindur ræðandi. Tað eru tilsamans 11 undirvísingartímar um vikuna, og tað krevur nógava fyrireikingartíð.

**Shino og Kano**

Eftir at vit eru komin til Ankpa, hevur Shino fyrst og fremst tikið sær av familjuni og heiminum. Skúlin er farin at byggja eina klinikk á skúlaøkinum. Vónandi kann Shino skjótt arbeiða har sum sjúkrarøktarfrøðingur. Men hetta kann taka rúma tíð, tí byggiarbeiðið er longu steðgað orsakað av vantandi peningi. Ætlanin er, at Shino skal hjálpa á bókasavninum, tá ið til ber, inntil klinikkin verður klár.

Vit eru glað um, at Kano trívist væl her og tolir væl hitan. Henni dámar sera væl at spæla við hini børnini, sum búgva á skúlaøkinum, hóast tey eru eitt sindur eldri. Eisini dámar henni væl at renna eftir hønunum og hyggja at geitunum, sum ganga runt her.

**Jól og Jos**

Vit vóru í Jos á jólum. Sum tit kanska hava hoyrt, hevur verið eitt sindur av ófriði har síðani jólaaftan. Vit høvdu tað øll gott, men onkrar dagar kundu vit ikki fara út um tað økið, vit búðu á. Vit kendu okkum ikki nakað serliga hótt, tí ófriðurin er nakrar kilometar hiðani og hevur sum so einki við útlendingar at gera. Vit vórðu kortini biðin um at fara úr Jos og komu aftur til Ankpa tann 30. desembur.

**Takkið Harranum fyri**

- At vit komu til Nigeria og til Ankpa í øllum góðum
- At vit trívast væl og verða so við og við von við tann øðrvísi lívsstílin

**Biðið fyri**

- Heilsu okkara, serliga Kano
- Fyrireikingarnar til undirvísingina í vetur, og at hon verður hóskandi til næmingarnar og teirra tørv
- At vit finna eina hóskandi samkomu at ganga í

Um Harrin leggur tær á hjarta at stuðla hesum verkinum, ber til at flyta pening á okkara kontu til endamálið í Føroya Banka 6460-4194464. Vit vilja eisini fegin samskifta við tykkum gjøgnum teldupost á hallur.mortensen@missionafrica.org.uk ella skarvur@gmail.com ella á Facebook.

Harrin signi tykkum øllum.

**Vinarliga**
**Hallur, Shino og Kano Mortensen**















*Biðið fyri okkum*